# Ungfólk syngja seg á tindin

Ársins Songrødd hevur seinastu 20 árini verið fastur partur av føroyska tónleikalívinum, og nógvir kendir sangarar eru fyrstu ferð komnir fram í hesi kapping. Nú kann enn ein ung – og enn ókend – songkvinna kalla seg Ársins Songrødd



*Barbara Abrahamsen er Ársins Songrødd 2004*




*Nógv er broytt, síðani fyrsta sangkappingin var á skránni mitt í 80'unum, men Árins Songrødd hevur verið sera seiglívið, og stórur áhugi er framvegis fyri at syngja við*

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Seinastu árini hava sangkappingar fyri opnum skermi verið nakað av tí populerasta, sum danskt sjónvarp hevur kunnað bjóðað sínum hyggjarum. Føroyingar hava eisini verið bitnir av hesum kappingum, tí sangarar úr Føroyum hava verið við í teimum og staðið seg væl.

Men føroyingar hava eisini í nógv ár gingið upp í eina aðra – og meira lokala – sangkapping. Tað er kappingin Ársins Songrødd, sum einaferð í tíðini eisini varð kallað Ársins Songlerkur.

Kappingin er í grundini einføld. Ein og hvør kann tekna seg til kappingina, og so ræður tað um at sannføra eitt dómarapanel um, at tú ert besti sangarin, tá ið kendir sangir úr útheiminum skulu syngjast live.

## Stór hending

Upprunin til Ársins Songrødd er at finna afturi í áttatiárunum, og tað var tað mest sum ein stórhending í føroyskum tónleikalívi, tá ið kappingin fyrstu árini varð á skránni.

Presto Booking, sum Hans Christian Joensen og Jan Rubeksen stóðu fyri, tók stig til kappingina mitt í 80'unum, og ætlaninar vóru stórar frá byrjan. Fyrsti vinnarin av kappingini gav eina lp-plátu út, og ætlanin var eisini, at lokalu vinnararnir skuldu vera saman um eina plátu, men hon kom ongantíð.

Seinni tók Farcon, har Páll Arge var ein av høvuðsmonnunum, yvir og hevði kappingina í nógv ár, men nú eru tað heilt aðrir fyrireikarar av kappingini.

Tíðarinnar tonn kann verða eirindaleys, og hon hevur kanska eisini tikið eitt sindur av glansinum av Ársins Songrødd kappingini, men framvegis er áhugin fyri at vera við í hesi kapping sera stórur.

## Ungfólk eru við

Tað eru serliga ungfólk – ofta blaðung fólk – sum eru við í kappingini, men tað kemur meira enn so fyri, at meira royndir sangarar royna seg, og í ár hevur undirtøkan millum dreingirnar verið størri enn vanligt.

Tað eru nógvir kendir vinnarar av Ársins Songrødd gjøgnum tíðina, og tað hevur víst seg, at fleir av okkara kendu sangarum eru fyrstu ferð komnir fram í hesi kapping. Eingin kendi nakað til Eivør Pálsdóttir, tá ið hon vann Ársins Songrødd, og tað sama var við Guðruni Sólju Jacobsen. Harafturat hava nógvir aðrir kendir og minni kendir sangarar verið við og vunnið, og tað eru ivaleyst eisini onkur fólk, sum angrað seg grønan av at hava bjóða seg fram...

## Ársins kapping

Kappingin í ár endaði seinasta leygarkvøld við eini finalu í Badmintonhøllini í Havn, og har var ein ung – og enn ókend – songkvinna vinnari. Tað var Barbara Abrahamsen á Argjum, sum dómararnir tóku fram um øll hini, sum sungu í finaluni.

Ársins kapping byrjaði 17. apríl, tá ið fyrsta av fimm innleiðandi umførum hildið í ítróttarhøllini á Kambsdali, og síðani hevur Songrøddin verið í Trongisvági, í Havn og í Fuglafirði. Kappingin kemur ikki so víða, sum hon gjørdi onkuntíð fyrr, men har, hon hevur verið, hevur áhugin fyri at verða við verið stórur.

10 finalistar vóru við í finaluni farna vikuskiftið, og vinnarin fekk ikki bert heiðurin at kunna kalla seg Ársins Songrødd, men eisini 10.000 krónur burtur úr.

Tey, sum sungu í finaluni, vóru: Lív Næs og Nicolina Midjord, Ólavur Larsen, Jenny Old, Eyðstein Jacobsen, Birita Bisp & Co, Bára S. Samuelsen, N. Barbara Abrahamsen, Kristleyg Hansen, Gudney Rasmussen og Jógvan Joensen

Umframt hesar sangarar hava eisini eini 40 onnur fólk verið á pallinum og sungið í teimum innleiðandi kappingunum, men tey komu ikki við til finaluna.

Í ár var skipanin tann, at fólk hava kunna valt meira ella minni frítt millum allar sangar, sum hugsast kunnu. Onnur ár hava fyrireikararnir avmarkað valið til nakrar ávísar sangir, og tá hevur ein keðilig avleiðing verið, at nógv hava sungið somu sangir.

Hesum slapst undan í ár, tí sangirnir í finaluni eru sera ymiskir, og gjørdi ikki undirhaldið, men kanska var tað eisini truplari at døma, tí tað var ikki líka lætt at samanlíkna teir ymsu sangararnar.

Nú kann enn ein ung songkvinna kalla seg Ársins Songrødd, og tíðin fer at vísa, hvat hon kann fáa burtur úr hesum.



*Fimm innleiðandi umfør hava verið í ár, og leygarkvøldið verður finalan á serliga bygda pallinum í Badmintonhøllini í Havn*



Ráðstevna um fiskivinnu á Hotel Føroyum:

# Íslendska fiskivinnan styrkir sína støðu

**Hósdagin og fríggjadagin í seinastu viku var stór fiskivinnuráðstevna á Hotel Føroyum, sum fyritøkan, Farec International hjá Óla Samró, skipaði fyri**



*– Kappingarførið hjá føroysku fiskivinnuni er versnað. Orsøkin er í høvuðsheitum tann kapping, sum er um ráfiskin og økta globaliseringin, sum vísir seg at raka okkara fiskivinnu meint, sigur Óli Samró*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

RÁÐSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var Jóannes Ejdesgaard, løgmaður, sum setti stevnuna.

Løgmaður legði dent á, at í einum landi sum Føroyum, har fiskivinnan hevur so ómetaliga stóran samfelagsligan týdning, er tað ógvuliga avgerandi, at vinnan verður stýrd við ábyrgd.

Í setanarrøðu síni fegnaðist hann um, at skipanin við fiskidøgum, sum vit hava í Føroyum, hevur vakt so stóran ans millum politikarar, vinnulívsfólk og granskarar í øðrum londum.

– Men tað er eisini umráðandi, at vit í Føroyum geva okkum stundir at lurta og læra av royndunum hjá øðrum, soleiðis at vit kunnu tillaga okkara vinnu eftir altjóða reglum, sum nú einaferð eru galdandi.

## Lykilin

Jóannes Ejdesgaard helt, at lykilin til eina burðardygga fiskivinnu er, at vit duga at tillaga okkum eftir ofta stuttfreistaðu umstøðunum, sum ráða innan hesa vinnu, samstundis sum ætlanir verða lagdar um framtíðina.

Løgmaður nýtti høvi at takka teimum mongu útlendsku gestunum, sum komnir vóru til ráðstevnuna, eins og hann takkaði Óla Samró fyri at hava tikið stig til og fyrireika eina so viðkomandi ráðstevnu í Føroyum.

Á ráðstevnuni á Hotel Føroyum vórðu nógvir fyrilestrar hildnir av útlendingum, sum eru kapasitetar á ymiskum økjum innan fiskivinnuna.

Leiðarin á Fiskirannsóknarstovuni, Hjalti í Jákupsstovu, helt eisini ein fyrilestur, og tað gjørdi Óli Samró, ið fyriskipaði stevnuna, eisini.

Aðrir føroyingar, sum hildu fyrilestur, vóru Johnny í Grótinum og Sveinur Tummasarson.

Ein av teimum, sum setti sín serstaka dám á ráðstevnuna, var ísreaelsmaðurin, Menakhem Ben-Yami, sum vit fara at venda aftur til í einum øðrum blaði.

## Gongdin

Óli Samró hevur sett sær fyri neyvt at finna út av, hvussu gongdin er innan fiskivinnuna í eitt nú Føroyum, Íslandi og Noregi.

Tølini í Farec-skipanini, sum felagið hevur bygt upp seinastu árini, vísa í stuttum, at Ísland hevur styrkt sína støðu innan fiskivinnuna, meðan eitt nú føroyska fiskivinnan hevur havt eina munandi afturgongd seinastu tvey árini. Í mun til íslendsku og føroysku fiskivinnuna, er norska fiskivinnan tó uppaftur verri fyri.

Í fimm ár hevur Óli Samró savnað tøl um fiskivinnuna í hesum trimum londunum, og í hesum sambandi hevur hann eisini samanborið gongdina.

Í skrásetingini hjá Farec er talan bæði um vinnuna á sjógvi og landi.

Tað, sum sermerkir arbeiðið hjá Farec, er, at tú kanst síggja, hvussu gongdin er hjá hvørjum einstøkum skipi gjøgnum alt árið. Eisini kann skipanini hjá fyritøkuni gera sínar metingar um eitt nú gongdina í árinum sum kemur.

## Afturgongd

– Afturgongdin í føroysku fiskivinnuni er hin mest týðiliga seinastu tvey árini. Tølini vísa, at bæði í vinnuni á landi og á sjónum fæst minni burtur úr hvørjum kilo av fiski í dag enn fyri tveimum árum síðan, sigur Óli Samró.

Hann vísir á, at okkara kappingarføri er versnað, og orsøkin er í høvuðsheitum kappingin um ráfiskin og økta globaliseringin, sum vísir seg at raka okkara fiskivinnu meint.

Tølini hjá Farec vísa annars, at føroyska fiskivinnan var hon, sum hevði størstu framgongdina samanborið við Ísland og Noregi árini, 1998-2002.

Óli Samró sigur, at tølini vísa eisini, at norska fiskivinnan er rættiliga illa fyri – og uppaftur verri fyri enn føroyska fiskivinnan.

– Øll árini, sum vit hava arbeitt við, er støðan hjá norsku fiskivinnuni viknað mótvegis føroysku og íslendsku fiskivinnuni, sigur Óli Samró.



*Tølini hjá Farec vísa, at føroyska fiskivinnan var hon, sum hevði størstu framgongdina samanborið við Ísland og Noregi árini, 1998-2002. Men nú er vent í holuni. Støðan hjá norsku fiskivinnuni er tó hon, sum er viknað mest seinastu árini*

*Mynd: Jens Kr. Vang*